# Kaggin vann sannførandi á føroyameistarunum

**Kaggin hevur aftur lagt seg á odda í billardkappingini fyri lið, tá hann í vikuskiftinum ruddaði borðið ímóti trýfalt føroyameistaraliðnum úr Klaksvík. Ungi Bjarni Skaalum hevði sína bestu kapping nakrantíð. Henrik Petersen hevði eisini framúr góðan dag, tá Havnar Klubbi vann stórt á Kagganum 2. Munurin millum trý tey bestu liðini er bert seks stig**



*Njál Petersen úr Klaksvíkar Billardfelag sýnir oftani sera gott spæl, men hesaferð tapti hann allar dystirnar móti Kagganum*

BILLARD
*Tíðindaskriv*

Tað munnu vera mong ár síðani, at besta liðið hjá Klaksvíkar Billardfelag og føroyameistari trý tey seinastu árini hevur fingið ein slíkan avsmurning sum hetta vikuskiftið í Kagganum. Tá kappingin varð liðug leygardagin máttu klaksvíkingar tungu leiðina heimaftur við einans seks stigum í skjáttuni. Kaggaliðið mannað av tí unga og sera vælspælandi Bjarna Skaalum og tveimum gomlum fyrrverandi Mimirsspælarum, Steinbjørn í Dali og Jan Müller tók FM-liðið á bóli. Serstakliga var tað Bjarni, sum fekk sítt spæla at koyra sum ongantíð áður. Hann kom,sá og sigraði hesin ungi kaggaalvin. Hann vann allar sínar dystir og endaði við einum meðaltali uppá 32,5, tað besta hann nakrantíð hevur havt í eini kapping. Dystirnir vórðu uppá 828, 614 og 508. Eisini átti hann besta einstaka umfarið uppá 150 eygu. Steinbjørn og Jan fingu part av tí gamla spælinum frá Mimirstíðini framaftur. Jan hevði 21,63 í meðal og Steinbjørn 19,7.

Á liðnum hjá klaksvíkingum var standurin ringur. Stórspælarin Kirsjan Sune Høgnesen vann tveir av dystunum tepurt og skulu vit leita mong ár aftur ´í tíðina at finna eitt so lágt meðaltal sum hesaferð. Krisjan Sune fekk ikki spæl sítt at koyra og endaði við 21,1 eygum í meðal. Sonhard Johannesen hevði heldur ikki sín besta dag, hann endaði á 18,9 eygum í meðal og vann bert ein dyst. Triði maður á liðnum, Njál Petersen, sum annars kann vísa gott spæl, tapti allar dystirnar og endaði á 14,2 eygum í meðal.

Dystast var eisini í Havnar Klubba. Kaggin 2 var á vitjan og mátti fara heimaftur við stórtapi. Klubbin vann 14-4. Og her var tað stórspælarin Henrik Petersen sum brillieraði. Hann hevði omanfyri 30 eygu í meðal, besti dysturin var omanfyri 860 og besta umfar hansara var omanfyri 240. So tað rullar hjá verandi FM-meistara í liðkappingini eisini. Næstbestur var Carsten Hansen úr Havnar Klubba, sum eisini vann allar sínar dystir og hevði eitt meðal uppá 20. Niels Nielsen fekk bert tvey stig móti Kagganum. Tvs. øll fýra stigini hjá Kagganum 2 fingu teir frá Niels. Spælarnir á Kaggaliðnum vóru Anfinn Hansen, Heimir Ottoson og Johannes Skaarup.

**Støðan er 1. deild er nú henda:**
Nr. 1. Kaggin 1 við 36 stigum, nr. 2 Klaksvíkar Billardfelag við 32 stigum, nr. 3 Havnar Klubbi við 30 stigum og nr. 4 Kaggin 2 við 10 stigum. Munurin er lítil millum liðini og verður tí spennandi at fylgja við komandi tríggjar kappingarnar.

Í 2. deild hevur Havnar Klubbi vunnið 16-2 á Tvøroyrar Klubbi. Her var Høgni Højgaard nógv bestur við seks stigum og 11,27 eygum í meðal. Næstur honum var Jógvan Jørgensen við 8,57 eygum og 3. bestur var Hans Jørn Nielsen eisini úr Havnar Klubba við 7,27 eygum í meðal. Bestur hjá tvøramonnum var Rókur Dimon við 7,90 eygum í meðal. Havnar Klubbi hevur eisini vunnið móti Klaksvíkar Billardfelag við 12-6. Bestur var Jógvan Jørgensen úr Havnar Klubba vuið 13,77 eygum. Bestur á liðnum hjá klaksvíkingum var Jákup E. Johannesen við 7,67 eygum í meðal.



*Kaggin 1, sum nú er á odda í liðkappingini í billard, tó bert fýra stig frammanfyri Klaksvíkar Billardfelag og bert seks stig frammanfyri Havnar Klubba. Fv. Bjarni Skaalum, Jan Müller og Steinbjørn í Dali*

# MB verður 100

Fríggjadagin, 21. januar, eru liðin 100 ár síðani, at Miðvágs Bóltfelag varð sett á stovn. Tað var presturin, Carl Johansen, sum tók stig til hetta.

Við einum 100 ára degi hoyrir sjálvandi eisini hátíðarhald, og fríggjadagin fara tey í MB so eisini at markera dagin.

Kl. 19.00 verður ítróttargudstænasta í Miðvágs Kirkju, sum Inga P. Dam og David Johannesen standa fyri. Eisini fara Sámal Ravnsfjall, Eivind á Presttrøðni og Ungdómskórið í Vágum at taka lut. Samstundis verða dyrnar í Bygdarhúsinum í Miðvági lætnar upp..

Kl. 20.00 verður so móttøka í Bygdarhúsinum. Har fara fleiri av teimum, sum onkursvegna hava havt samband við MB, at flyta fram røðu, eins og nakað verður til matna til gestirnar, sum vónandi verða nógvir í tali.

**-jm**

## Hyggjarametet

Danir fylgja væl við, nú Thomas Gravesen skift til spanska stórfelagið, Real Madrid.

Fyrsti dysturin hjá Gravesen fyri nýggja felagið var sunnukvøldið, og á Kanal 5, sum sendir beinleiðis frá bestu sponsku deildini, lata tey væl at. Ikki færri enn 283 danir sótu framman fyri skíggjan, tá Gravesen móti dystarenda varð skiftur inn í dystinum móti Zaragossa, og hetta er so væl og virðiliga nýtt hyggjaramet hjá støðini. Gamla metið var annars bara eina viku gamalt. Tá fylgdu 116.000 danir við, tá Jesper Grønkjær leikti sín fyrsta dyst fyri Athletico Madrid.

**-jm**

## Nýggjur makkari til John

Nýggja felagið hjá John Petersen, Holstebro – ella HB – sum spælir í triðbestu donsku røðini, hevur nú fingið enn ein álopsleikara til felagið. Talan er um Morten Bang, sum hóast álopskenda eftirnavnið ikki hevur spælt tað stóra fyri oddaliðið í deildini, Brabrand. Bang verður lýstur sum ein kvikur og vandamikil leikari, og roknað verður tí við, at hann fer at hóska væl saman við John Petersen í nýggja álopinum hjá HB.

**-jm**

## Dopað tennisstjørna

Og russiska tennis-stjørnan, Svetlana Kuznetsova, er nú tikin fyri nýtslu av ólóglim evnum. Í sambandi við ein framsýningardyst í desember mánaði skuldi hon lata dopingroynd, og hendan hevur nú víst seg at innihalda effedrin, sum er á listanum yvir ólóglig stimbrandi evni. Svetlana Kuznetsova er nummar fimm á altjóða styrkislistanum, og í fjør vann hon millum annað US-open kappingina.

**-jm**